# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð.
# Bygdarráðsfundur tann 31. august 2016, kl. $19^{00}$.

**Bygdarráðslimir á fundi:** Pauli T. Petersen, Karl A. Olsen, Hilbert Elisson, Malan Stórá, Herit Magnussen, Durita á Heygum og John Zachariassen
**Skrivari:** Maud Poulsen

---

**Mál 181**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini um stuðul til verkætlanina at framleiða eitt borðspæl, sum eitur Herferð.
J.nr. 20.00.00-G01-2--16

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 23. august 2016 umsókn um stuðul til verkætlan at framleiða eitt borðspæl, sum eitur Herferð.

Mennararnir aftan fyri spælið Herferð bjóða Vestmanna Kommunu at gerast partur av verkætlanini við at fáa økið Vestmanna á borðspælið, kunning á staðarkorti, lýsingarøki og búmerki. Kostnaðurin fyri hetta er kr. 10.000.

Nevndin mælir til at játta kr. 10.000 í stuðli til verkætlanina.

**Viðv. 181**
Tilmælið var einmælt samtykt.

**Mál 182**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini um umsókn um stuðul til Fjarastevnuna 2016.
J.nr. 20.15.00-Ø40-1-14

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi 23. august 2016 umsókn frá VÍF Kappróðri um stuðul til Fjarðastevnuna 2016. Søkt verður um 20.000 kr í stuðli. sum er ætlað til at skipa fyri tiltøkum á stevnuni, m.a. ókeypis tónleik á kaiøkinum og øðrum til frama fyri hugna á stevnuni.

Umsóknin kom inn beint áðrenn Fjarðastevnuna. Av tí at eingin nevndarfundur var tá, var umsóknin viðgjørd á nevndarfundinum í august.

Nevndin mælir til at stuðla VÍF Kappróðri við kr. 20.000 í sambandi við Fjarðastevnuna 2016.

**Viðv. 182**
Tilmælið var einmælt samtykt.

**Mál 183**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini um keyp av bili til umsitingina.
J.nr. 83.11.00-G01-1-16

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 23. august 2016 tilmæli frá Teknisku nevnd um at játta fígging til at keypa ein bil til umsitingina.

Arbeiðsuppgávurnar hjá tekniska leiðaranum og umsitingini annars, sum eru úti úr húsinum gera, at tað er stórur tørvur á einum bili.

Nevndin mælir til at keypa ein bil til umsitingina, og at játta fígging til keypið á eykajáttan í heyst.

**Viðv. 183**
Tilmælið var einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 20.30

Sign.:

Pauli T. Petersen Karl A. Olsen Durita á Heygum

Hilbert Elisson Herit Magnussen Malan Stórá John Zachariassen

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 23.00

Sign.:

Pauli T. Petersen Karl A. Olsen Durita á Heygum

Hilbert Elisson Herit Magnussen Malan Stórá John Zachariassen